# Vilja hava óheftan skúlaleiðara í Skopun

**Skúlastýrið í Skopun tekur undir við foreldrunum, sum hava heitt á Mentamálastýrið um at koyra Ingun Simonsen frá sum skúlaleiðara**

SKÚLASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*



*Seinastu tíðina hevur rættiligt stríð tikið seg upp um skúlan í Skopun og nú hevur eisini meirilutin av skúlastýrinum í Skopun mælt til at Ingun Simonsen verður koyrd úr starvi sum fyrstilærari*

Skúlastýrið í Skopun tekur undir við foreldrunum í Skopun, sum vilja hava Ingun Simonsen, fyrstalærara, koyrdan frá.

Tað var í farnu viku, at stívliga tjúgu foreldur í Skopun skrivaðu Mentamálastýrinum bræv, har tey heittu á stýrið um at seta Ingun Simonsen frá.

Samstundis varð sama skriv sent skriv sent skúlastýrinum, sum viðgjørdi málið mikukvøldið.

Skúlastýrið tók málið upp, hóast sakførarin hjá fyrstalæraranum vísti á, at stýrið hevði ikki heimild at viðgera málið tí tað lá uttanfyri virkisøki hjá tí.

Av tí sama vildi Ingun Simonsen, sum er skrivari í skúlastýrinum, ikki at møta á fundinum.

Umframt Ingun Simonsen var tað ein eisini annar limur í skúlastýrinum, sum heldur ikki møtti, tað var ein lærari, sum umboðaði skúlan.

Men øll hini fimm, sum vóru á fundinum, samtyktu at taka undir við foreldrunum.

### Uttanveltaðan fyrstalærara

Tey fimm limirnir í skúlastýrinum, sum møttu á fundi, samtyktu einmælt at skriva Mentamálastýrinum bræv, har tey vísa á, at tey taka undir við foreldrinum og mæla til at Ingun Simonsen verður sett frá sum fyrstilærari.

Men samstundis mæla tey til, at tann fyrstilærarin, sum verður settur, skal verða uttaneftir.

Sostatt mæla tey ikki til, at Sigurd Bærentsen, sum hevur verið nógv frammi í skúlastríðnum í Skopun, verður settur sum skúlaleiðari.

– Skúlastýrið heldur, at tað er frægast, at tað verður ein heilt uttanveltaður fyrstilærari, sum verður settur, fyri at fáa varandi arbeiðsfrið á skúlanum og í bygdini, siga vælvitandi keldur í Skopun.

Umframt Ingun Simonsen, var tað annars bara áðurnevndi Sigurd Bærentsen, ið søkti starvið sum fyrstilærari, tá ið tað varð sett í 1997.

Skúlastýrið innstillaði bara Sigurd Bærentsen til starvið, men Landsstýrið gjørdi av at seta Ingun Simonsen.

Síðani hava umfatandi samstarvstrupulleikar verið á skúlanum og tað endaði við, at Mentamálastýrið nýliga mælti til at flyta Sigurd Simonsen í annan skúla at arbeiða.

Tað skilst, at tað serliga var hetta, sum fekk foreldrini í Skopun at taka seg saman og at savna inn undirskriftirnar til Mentamálastýrið um at fáa Ingun Simonsen frá.

# Smyril klárur fríggjadagin

**– Steðgurin hjá Smyrli í dokkini á Skála verður nakað drúgvari enn væntað**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Tey, sum hava brúk fyri at ferðast ímillum Havnina og Suðuroyar, mugu taka til takkar við estlendsku ferjuna, Scaniu í eina heila viku afturat.

Tað verður nevniliga ikki, fyrrenn næsta fríggjadag, at Smyril verður liðugur í dokkini á Skála og kanna taka siglingina um Suðuroyarfjørð uppaftur.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sigur, at tað fer at taka nakrar dagar longri enn vænta at fáa tær umvælingar gjørdar á Smyrli, sum skuldi gerast.

Tað, sum gjørdi, at hann verður seinkaður, er, at bógskrúvan mátti til Danmarkar til umvælingar.

– Hon kemur aftur til Føroya mánadagin og tað skal ganga óvanliga illa, verður Smyril ikki settur aftur í sigling fríggjadagin, sigur hann.

Men hann leggur afturat, at tá ið Smyril fer at taka siglingina uppaftur, verður tað eitt heilt annað skip, tí nógvar og stórar ábøtur eru gjørdar.

– Umframt tað sum trygdareftirlitið kravdi, er nógv gjørt umborð fyri at gera hann hugaligari hjá ferðafólki, sigur tekniski stjórin.

Eitt nú eru nýggj flúgvarasetur sett í og harumframt eru øll teppi skift út og benkur og stólar eru klødd av nýggjum o.s.fr.

Og so mugu suðuroyingar venja seg við, at Smyril hevur fingið nýggjan lit, tí nú er hann eisini málaður og hevur fingið tann nýggja, bláa litin hjá Strandferðsluni.

Sostatt eru øll skipini hjá Strandferðsluni nú blá.

Samstundis verður ferðasambandið ímillum Suðuroynna og Havnina røkt við Scaniu, sum tekur ferðafólk, persónbilar og eitt sindur av farmi og so Claire, ið siglur við farmi fýra dagar um vikuna.

Strandferðslan hevur nú sveisað festi í biladekki á Scaniu, so at hon fær tikið einar seks bingjur á vognum, so eitt sindur av farmi fær hon flutt.



*Ferðasambandið um Suðuroyarfjørð hevur verið ein fløkja ímeðan Smyril hevur verið í dokk. Fyrst var Scania sett í sigling, síðani Dúgvan og so aftur Scania. Her koma ferðafólk í land av Dúgvuni tann eina túrin, hon slapp at leggja at á Drelnesi*



Peter Skjeel, veðurfrøðingur á Sosialinum:

# - Hampuligt veður á Norðoyastevnu

**Veðrið á Norðoyastevnu verður ikki av tí ringasta. Onkuntíð verður eitt sindur av regni, men sambært veðurkortinum, so ætlar sólin sær eisini at koma onkran túrin norður**

NORÐOYASTEVNAN
*Ragnhild Ellingsgaard*



**Klaksvík:** Hóast skjøtil er settur á Norðoyastevnuna, so er tað ikki hendan, ið prátið snýr seg um í Klaksvík hesar dagarnar.

Fólk hava heldur hug til at práta um veðrið, og hvør roynir eftir sínum førimuni at vissa hvør annan um, at vit fara at fáa gott veður teir komandi veitsludagarnar.

### Onkur sólglotti

Sum vera man, hevur veðrið stóran týdning fyri, hvussu væl eydnað, ein stevna verður.

Men sambært Peter Skjeel, veðurfrøðingi á Sosialinum, so nýtist norðingum ikki at stúra so nógv fyri veðrinum hesa Norðoyastevnuna.

Peter hevur kagað sær í veðurkortini, og eru útlitini fyri hamuligum veðrið avgjørt til staðar.

Leygardagin kunnu klaksvíkingar tó vænta sær eitt sindur av regni fyrrapartin, men út á seinnapartin skuldi verði betri.

Tá kemur hann av útsynningi, og er hetta ein góð ætt í Klaksvík.

Hitin kemur at liggja um 10 til 13 hitastig, og sólin verður væntandi eisini at síggja.

### Sunnudagin turt

Sunnudagin liggur ættin mest umkring sunnan, og verður veðrið tá hampuliga turt við onkrum sólglottum. Hitin verður tann sami, men seinni um kvøldið kunnu klaksvíkingar tó vænta sær nakrar dropar at falla frá himni.

– Men hóast tað, so kunnu vit vænta okkum hampuligt Norðoyastevnuveður, heldur Peter Skjeel.

Hann leggur eisini afturat, at ymiskt er, hvussu veðrið plagar at hætta sær á Norðoyastevnu.

Onkuntíð hevur verið heilt gott veður, meðan veðrið aðrar tíðir hevur verið stak vánaligt.

– Hetta kemst av, at Norðoyastevnan liggur so tíðliga á árinum, og tá kann veðrið verða rættiliga skiftandi, greiðir hann frá.

# Framsýning hjá Draganum

**Enn einaferð skipar stuðulsfelagið Dragin fyri eini framsýning á Norðoyastevnu. Hetta er samstundis tann 9. framsýninginin hjá felagnum á rað, og fer allur peningurin til at umbyggja M/B Dragan til eitt skúlaskip**

FRAMSÝNING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Í fleiri ár hevur tað verið ein fastur táttur hjá stuðulsfelagnum Dragin at skipa fyri framsýning á Norðoyastevnu.

Framsýningin í ár verður býtt sundur í tveir partar, har tann eini sýnir myndir av náttúrini og djóralívinum á Antarktis, sum týski myndamaðurin Klaus Kieselwetter hevur tikið.

Klaus hevur seinastu tvey árini siglt við ferðamannaskipum til Antarktis, og er tað her, at hann hevur tikið myndirnar.

### Hendur og hugflog

Hin parturin eru lutir, sum listarfólk úr Klaksvík hava latið úr hondum.

Millum lutirnar eru eisini borð og stólar, sum eru føroyskt design og føroyskt handverk.

Tað er Rógvi í Bø, sum hevur teknað, meðan Jógvan Abs. Absalonssen hevur evnað til.

Eisini aðrir forvitnisligir lutir verða at síggja á framsýningini.

### Hátíðarhald

Norðoya Sparikassi hevur ognað sær flestu lutirnar, ið sýndir verða fram, og í hesum sambandi skipaði sparikassin fríggjakvøldið fyri einum lítlum hátíðarhaldið, til heiðurs fyri listarfólkini. Framsýningin verður annars opin Norðoyastevnuaftan frá klokkan 16 til 21, og Norðoyastevnudag frá klokkan 15 til 22.



# Fjotto og Bobo eisini á Norðoyastevnu

**Undirhald fyri bæði yngri og eldrum verður í fimleikarhøllini í Klaksvík, tá væl umtóktu klovnarnir Fjotto og Bobo fara at undirhalda**

UNDIRHALD
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Á Norðoyastevnu í ár verður roynt at gera meir til stuttleika fyri teim yngru børnunum – og kanska eisini fyri »de barnlige sjæle«.

Klovnarnir Fjotto og Bobo hava undirhildi kring allar Føroyar, og á Norðoyastevnu koma teir at vitja Klaksvík.

Her fara teir at undirhalda og vísa síni gandakynstir fyri bæði ungum og gomlum.

Teir báðir verða at hitta í fimleikarhøllini fríggjakvøldið klokkan 20, og aftur Norðoyastevnuaftan klokkan 19.30.


## Verkfrøðingur til Føroya Tele - Radiodeildin

"Ein flúgvari er ein teknisk ómøguligheit"

Lord Kelvin
- orðførandi í bretska Vísindaakademinum - 1895



Søkt verður eftir verkfrøðingi til radiodeildina á Føroya Tele. Radiodeildin er ein deild undir teknisku deild og ábyrgdarøki hjá radiodeildini eru m.a.:

· mikrobylgjuskipanir
· satelittjørðstøð
· fartelefonskipanir
· útvarps- og sjónvarpssendinetið
· tráðleysar skipanir

Uppgávan er í høvuðsheitum at reka og menna alt innan radiosamskifti á Føroya Tele, herundir millumoyggja radiosamskifti, satelittskipanir, NMT og GSM radiostøðir, útvarps- og sjónvarpssendinetið.

Arbeiðsøkið er alt landið, tó við høvuðsstøð í Tórshavn.

Starvið verður lønt sambært sáttmálanum hjá Verkfrøðingafelagnum.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jens Julian Reinert, leiðara á Radiodeildini, á tel. 303540.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. juni 2002.

Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

- ella við telduposti til ft@ft.fo

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vil verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*